www.oljan.fo

Jan Müller 01 - 10 - 2013

Greenpeace mótmælir fongsling í Ruslandi

Hóast russiski forsetin herfyri segði, at tiltakið hjá Greenpeace-fólkum móti einum russiskum boripalli í Barentshavinum ikki var at meta sum eitt sjórán, so tykjast myndugleikarnir í Murmansk møguliga at hava eina aðra áskoðan. Herfyri tók rætturin har avgerð um at seta 30 fólk frá Greenpeace í fongsul í tveir mánaðir, tí hann metti hesi hava verið ein verulig hóttan móti russiskum boripalli og fólkunum umborð. Nú verður kannað um fólkini skulu rættarsøkjast sambært lógini um sjórán. Nakað sum Putin forseti kortini hevur víst aftur í samrøðu við Reuters. Tey 30 mótmæltisfólkini hjá Greenpeace, sum koma úr nógvum londum, vóru við einum av tess skipum, Arctic Sunrise og høvdu sett nøkur av fólkunum umborð á ein av pallunum hjá Gazprom, tá russiski flotin legði uppí, tók skipið og sigldi tað til lands. Russiski rætturin sigur í síni avgerð at fongsla fólkini, at tey vóru í ferð at gera álop á pallin. Hóast Greenpeace ger alt fyri at fáa altjóða samfelagið at finnast at russiska atburðinum og vísir á, at teirra tiltak varð friðarligt, so roynir russiski rætturin nú at savna prógv, sum skulu vísa, at ætlanin var at gera seg inn á pallin. Í ringasta føri kunnu Greenpeace- fólk fáa dómar uppá 15 ára fongsul. Russar vilja heldur ikki geva fólkunum møguleika at verða leyslatin móti veðhaldi. Endamálið við tiltakinum hjá Greenpeace í russiska partinum av Barentshavinum var at mótmæla boringum í Arktis. Felagsskapurin heldur ikki, at oljufeløgini gera nokk fyri at tryggja umhvørvið móti dálking og er ímóti oljuleiting í Arktis. Greenpeace sigur, at russar hava forbrotið seg móti altjóða lóg við at seta teirra fólk í fongsul og hava ein hálv millión fólk sent brøv til russiskar sendistovur fyri at mótmæla fonglingini og rættargongdini.
Keldur: Offshore.com